Vikuskiftið Sosialurin



# »Tillukku, góði Sosialurin«






*Gott er at fáa eitt sunkist og eitt club tá ein er í føðingardegi*

## Í gjár vóru 80 ár liðin, síðani Sosialurin kom út á fyrsta sinni. Hetta varð hátíðarhildið á redaktiónini í Havn – og í útibarnagarðinum í Haraldssundi

FØÐINGARDAGUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Haraldssund:** Veðrið er rættiliga skiftandi í Haraldssundi henda seinnapartin.

Viðhvørt er ælingur, sum næstu løtuna verður avloystur av sólskini og summarlýðku.

Hesar umstøðurnar forða kortini ikki teimum 12 børnunum í at vera bæði uttandura og inni. Seks teirra spæla við ymiskt inni, meðan restin er úti og gongur túr.

– Teimum dámar sera væl at vera úti og spæla. Spyrja vit tey, um tey hava hug at fara út, so eru tey beinanvegin við uppá tað, siga starvsfólkini.

Øll børnini eru úr Klaksvík og verða tey flutt fram og aftur við bussi.

### Veðrið eingin forðan

Hóast Haraldssund ikki telist millum fólkaríkastu bygdirnar, er kortini nógv ymiskt at gera og fara til hjá børnunum.

Her finst helst størsti "útibarnagarðurin" í teirri frálíku náttúruni kring bygdina, men eisini í sjálvari bygdini er mangt og hvat, sum kann verða til hugna og ítriv hjá børnunum.

Teimum dámar væl at fara oman í fjøruna, til spæliplássið í bygdini, til buchwald, og út í eitt gróthús, tey kalla Dólgahúsið. Tað er eisini hagani, at jólamaðurin plagar at koma.

Í gjáramorgunin vóru tey inni ein stóran part av fyrrapartinum, men tá tað fór at nærkast middegi varð avgjørt at fara út um at eta matpakkarnar.

Men tá tey skuldu fara út um byrjaði at regna eitt sindur. Hetta helt kortini ikki børnunum aftur í at vilja eta matpakka teirra uttanfyri.

Eftir at hava etið hann, fóru tey at hyggja eftir smálombum ymsa staðni í bygdini og spældu rundan um húsini, til tann stóri svarti bilurin hjá Sosialinum – Snoddi – kom framvið.

Við í bilinum vóru umboð fyri blaðið, sum í gjár fór um tey 80 árini. Her var eisini okkurt leskiligt at geva hesum fittu børnunum úr Klaksvík.

Hetta hugaði teimum sera